Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Árni Skaale, løgtingsmaður

Svarari: Høgni Hoydal, landsstýrismaður í uttanríkis- og vinnumálum

Evni: Ferðavinna

Spurningar:

1. Hvussu nógv ársverk eru í ferðavinnuni?
2. Hvussu nógv útlendsk starvsfólk arbeiða í ferðavinnuni samanborið við talið av ársverkum í vinnuni?
3. Hvat er miðalinntøkan fyri ein persón, sum arbeiðir í ferðavinnuni, og hvat er median inntøkan?
4. Hvussu er fordeilingin av størvum í ferðavinnuni, býtt uppá økir í landinum?
5. Hvussu nógvar fyritøkur í Føroyum eru skrásettar sum ferðavinnufyritøkur?

Viðmerkingar:

Ferðavinnan er framvegis ein lutfalsliga nýggj vinna í Føroyum. Av fleiri verður roknað við, at hendan vinnan skal vera/fer at verða okkara triðja bein at standa á, búskaparliga.

Men hvussu sær hendan vinnan út, og hvussu er hon skipað.
At tað eru fleiri útlendingar í starvsfólkahópinum hjá ferðavinnu-aktørunum er eyðsæð. Vit leggja merki til tað, tá vit mugu tosa eitt nú enskt á eini matstovu ella á einum hotelli. Men spurningurin er, hvussu stórur partur hetta er av starvsfólkunum í vinnuni.

Eisini er áhugavert at fáa at vita, um henda vinnan er á sama støði sum aðrar vinnur, tá talan er um inntøku og inntøkubýti, og hvar hendan vinnan er staðsett.

Á Løgtingi, 16. februar 2024

Árni Skaale